TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Bilførari til Endurnýtsluna á Hjalla

Endurnýtslan á Hjalla søkir við hesum eftir bilførara til bingjubilin.

Arbeiðsuppgávur
Høvuðsuppgávan er at røkja bingjuflutningin á Endurnýtsluni og Brennistøðini, herundir at skráseta nøgdir. Tú verður fastur bilførari á bingjubilinum og fær harvið ábyrgdina av at røkja bilin, ið er ein Mercedes Actros 2541 árg. 2003.
Harumframt kemur tú at luttaka í dagliga arbeiðnum á Endurnýtsluni, so sum at avgreiða og vegleiða viðskiftafólk, pakka burturkast, ið skal til serviðgerð, og halda økið reint og ruddiligt.

Vit ynskja
At tú hevur stóra koyrikortið og ert vanur at koyra lastbil. Vit ynskja eisini, at tú hevur teldukunnleika á brúkarastøði.
Kommununala Brennistøðin stendur frammanfyri stórum avbjóðingum. Stórur dentur verður lagdur á at minka um alheimsdálkingina. Tú skal hava áhuga fyri, og kenna tað sum tína ábyrgd, at náa tey mál, ið Kommunala Brennistøðin arbeiðir ímóti.

Setanarviðurskifti
Starvið verður sett skjótast til ber og verður sett sambært sáttmála hjá Havnar Arbeiðsmannafelag.

Meiri fæst at vita
Við at venda sær til Bárð Michelsen, deildarleiðara, tlf. 302040, ella Janus Isfeldt, deildarleiðara á starvsfólkadeildini, tlf. 302010.

Umsókn
Saman við viðmælum, avrit av koyrikorti og upplýsing um royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 20. september 2004. Viðmerk "Bilførari til Endurnýtsluna" á umsóknina.

Endurnýtslan

- er ein deild av Kommunalu Brennistøðini, ið stendur fyri allari burturkastviðgerð í Tórshavnar kommunu.

- tekur ímóti burturkastið frá vinnu og privatum. Burturkastið verður skilt í bingjur og verður síðani koyrt til brennistøðina, jarnplássið og tyrvingarplássið. Papp og pappír verður koyrt til IRF í Leirvík, meðan serligt burturkast verður sent til serviðgerð uttanlands.

www.torshavn.fo

Borðtennisfelagið TÓR

Venjingin byrjar týsdagin 14. september í fimleikahøll Eysturskúlans

Týsdag	Fríggjadag
17:00-18:45 Leikarar 14 ár og yngri.	17:00-18:45 Leikarar 14 ár og yngri.
18:45-21:00 Leikarar 15 ár og eldri.	18:45-21:00 Leikarar 15 ár og eldri.

Borðtennisfelagið TÓR

Sosialurin 341800

Sosialurin i Sosialurin

HALDIÐ SOSIALIN

450,- um ársfjórðingin
- sparið **395,-**
í mun til leysasølu

600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)

Sosialurin
ARGJAVEGUR 26 · POSTSMOGA 76 · 110-TÓRSHAVN · TEL 341800 · FAX 341801
POST@SOSIALURIN.FO · WWW.SOSIALURIN.FO

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fær blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: ____________
Bústaður: ____________
Postnr.: ____________
Bygd/býur: ____________
Telefon nr.: ____________
Undirskrift: ____________

Ókeypis
Verður sent óføstað
Sosialurin rindar postgjaldið

64

Sosialurin
Postmoga 76
110 Tórshavn

Sunnudag frá kl.11.30

Sunnudagsmenu

Atlantscocktail
við dressingi
og heimabakaðum breyði

Oksatournedos
við tilgjørdari soppasós,
grønmeti
og dagsins eplum

lættliga fryst
Sjokolátukøka

3 rættir 165,-
2 rættir 135,-
Børn ½ prís

RIO BRAVO RESTAURANT

RIO BRAVO · TÓRSGØTA 11 · TÓRSHAVN · TEL 31 97 67
· Beef & Steak House ·

teamBS

Rør teg fyri vælveru!

Kom og tak lut í Fólkaheilsurenningini, sum verður leygardagin 18. september í Tórshavn.

Nýt høvi at røra teg eitt sindur í frískari luft. Um tú gongur ella rennur, er tín avgerð. Mest umráðandi er, at tú luttekur. Og gloym ikki at taka alla familjuna, og allar vinir og kenningar við, tí dagurin er fyri øll.

Fólkaheilsurenningin byrjar uttanfyri Badmintonhøllina við stadionøkið í Gundadali leygardagin klokkan 15. Byrjanarnummar fæst 2 tímar undan renningini.

Luttøkugjald er 20 kr. fyri hvønn. Peningurin verður goldin, tá byrjanarnummarið verður avheintað.

Øll, sum luttaka, fáa frukt og okkurt leskiligt at drekka, umframt eina t-shirt til minnis um dagin. Heiðursmerki verða sjálvsagt til tey, sum vinna.

Melda teg til á www.athletics.fo, á Kunningardiskinum á flogvøllinum og á kunningarstovunum kring landið.

Vegna fyrireikararnar,
landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum og rennifelagið Bragdið

Takkarheilsa frá Kelduni í Skálafirði

Øllum tykkum, sum við gávum, blómum og á annan hátt gleddust saman við okkum á stóru vígslufestini vikuskiftið 3.-5. september takka vit hjartaliga. Vit biðja um Guds ríku signing yvir hvønn einstakan av tykkum.

Samkoman Keldan, Skálafirði

TILBOÐ!

Í viku 38 og 39 hava vit hesar prísir til pensionistar:
Permanent + klipping + vatnondulatión: **500,-**
Permanent + klipping + tóning + vatnondulatión: **600,-**

Kvilt Hárfríðkan
Áarvegur 20 · Tórshavn · Tel 316362